# BØNARLØTAN

Januar 2018 33. árg.

## GOTT NÝGGJÁR!

*Eg rópi til Gud, hin hægsta, til tann Gud,*
*sum fullførir verk Sítt fyri meg.*
*Sálmur 57.3*

*1. Nýggjársdagur* *1. Mós. 1.1-21*



*Deyvasamkoman í Fredericia.*



*Jan undirvísir deyvum á stevnu í Barcelona.*

**DANMARK, Brejning**
**Jan og Anne Zachariassen**

Jan er formaður í European Deaf Christian Bible Translator (EDCBT). Ætlanin er at stovna deyvabíbliufeløg í fleiri londum og at umseta Bíbliuna til landsins teknmál. Ráðgevarar frá Wycliffe, SIL og DOOR hjálpa til. Upptøkurúmið heima hjá Jan er nú klárt at gera evangeliskt tilfar í. Tørvur er á nýggjari teldu. Tey deyvu leiga høli í Fredericia til teknmálsmøtir. Jan vitjar tey deyvu í Keypmannahavn og Aarhus eina ferð um mánaðin.

## Møtir í Buli á Signabø

Poul Færø, Eyðun Reyðberg, Arni Simonsen og Jákup N. Olsen

5. jan. kl. 20.00 Manskórið í Ebenezer
6. jan. kl. 20.00 Kvartettin í Betesda
7. jan. kl. 19.00 John Færø og Triple Trio í Ebenezer

## NTM-FØROYAR

**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 6, Tabita 3, Debora 1**

Vit senda eitt ferðalið til missiónsstevnuna Reach í Onglandi 23. - 25. mars. Aldursmark 16-30 ár. Tilmelding innan 10. jan. Higartil hava 10 teknað seg. Enn er pláss, vælkomin við! Kunning á ntm.fo. Skriva til ntm@mail.fo ella ring á 215566

## KRINGVARPIÐ

7. jan. Sjónvarpsandakt, John Færø
14. jan. Sjónvarpsandakt, John Færø
21. jan. Sjónvarpsmøti, Hebron, Argir
4. febr. Útvarpsmøti, Filadelfia, Gøta

## R7 (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Føroysk møtir í Jútlandi

13. jan. kl 19 møti í Esbjerg, Ådalsparken 33

## ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn

**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *2. Týsdagur* *Matt. 1.1-17*



**DANMARK**
**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein (f)**
**Sigrid 10, Andreas 8, Kristina 6**

Sólvá og Jákup Hansen byrja 5. jan í Kristnastovu. Januar er próvtøkutíð og tí eisini krevjandi hjá nógvum lesandi. Fyrsta møtið sunnudag í nýggja árinum verður 7. jan. Møtini fríggjakvøld byrja aftur 13. jan.

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

## *3. Mikudagur* *5. Mós. 1.22-46*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eitt toymi úr Italia vitjar fyrst í jan. Biðið, at tey fáa fatan av lívinum á missiónsmarkini, og at Harrin opnar eygu teirra at skilja, at tað eisini er teirra ábyrgd at bera teimum gleðiboðskapin, sum enn ikki eru nádd. Seinni í jan. kemur ráðgevin í bíbliuumseting at kanna umseting mína av Rómbrævinum og Efesusbrævinum.

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 9**

Adonia fer undir nýggja viðgerð í jan. Eg haldi á í trúarverjutænastuni og øðrum tiltøkum, sum byrja í jan.

## *4. Hósdagur* *Sálmur 119.1-22*



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Biðið, at Harrin gevur vísdóm og leiðslu at taka rættar avgerðir í tænastuni fyrra hálvárið 2018. Spurningurin er, hvagar Atlantic Mission skal fara í apríl-mai. Vit eru takksom aftur í ár at kunna læna „Juvel II“. 31. jan. - 4. febr. hevur Svenning fundarrøð í Betesda, Klaksvík, saman við samverkamonnum.
**– Lis Zachariassen**
**– Rutt og John í Skemmuni**

## *5. Fríggjadagur* *Matt. 1.18-25*



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit eru í Teilandi í jan. á altjóða NTM leiðslufundum og á skeiði fyri trúboðarar og ráðgevarar innan samkomustovnan. Øll NTM-londini í Asia luttaka. Vit halda gullbrúdleyp 27. jan. í Chiang Mai saman við Dan, familjuni og arbeiðsfeløgum, sum eru í býnum tann dagin. Vit takka Harranum fyri hesi 50 árini og tænastuna saman.

**USA, Nebraska, New Tribes Mission**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 15**
13. jan. - 1. febr. vegleiðir Peter í Chiang Mai í Tailandi á altjóða fundum fyri leiðarar hjá NTM úr PNG, Indonesia, Filipsoyggjum, Teilandi o.ø. Honum tørvar vísdóm at hjálpa trúboðarunum.

## *6. Leygardagur* *5. Mós.2.1-15*

**THAILAND, Chang Mai**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 16, Jonathan 15, Leslie 15, Emily 7, Bethany 3**
Biðið fyri okkara Chiang Mai toymi, nú vit á skrivstovuni hava havt jólatiltak í grannabygdini. Hetta var framúr møguleiki at bera teimum søguna um Jesu føðing.



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 12, Aron 5, Noah Kristian 4**
Í jan. og febr. hava vit mest at gera. Í hesum tíðarskeiðnum koma trúboðarar úr øllum Asia til fundir í Chiang Mai.
★ Í dag fyllir Bethany Jacobsen 3 ár.

## *7. Sunnudagur* *Matt. 2.1-12*



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
**Jonathan Daniel 17, Ísak 15**
Vitjanin í Sorimi gekk væl; vit rættlósu meginpartin av Lukas saman við ráðgeva. Biðið fyri Marakai, leiðara í Wakumo samkomuni. Yngsti sonurin og mamman doyðu fyri stuttum. Eg haldi á at umseta. Mær tørvar vísdóm.



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**
Okkum tørvar forbøn, sum vit halda á í verkinum á Malta. Takk fyri gott samstarv í 2017.

## *8. Mánadagur* *5. Mós. 2.16-37*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit hava umsett 1. og 2. Tessalonikabræv, 1. og 2. Timoteusarbræv og Titusarbræv. Biðið, at Gud vísir okkum, hvørja bók vit skulu umseta næst, og at samkomuleiðarar síggja tørvin á at nýta mixtec á møtum.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 13, Victoria, 11, Emma Grace 9, Jónatan 8, Markus 5, Evita Linda 2, Joy Hanna 0**

Til árliga jólahaldið á leguni bjóðar samkoman familjum og vinum við, sum ikki eru komin til trúgv. Í ár komu uml. 50 boðin umframt tey úr samkomuni – meir enn fullur bussur. Evangeliið varð boðað. Biðið um ávøkst!

★ Í dag fyllir Ragnhild Sharp 14 ár.

## *9. Týsdagur* *Matt. 2.13-23*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

Vit eru Harranum takksom, at hann hevur verið trúfastur og signað verkið ríkliga, síðan vit byrjaðu í 1973. Gleðiligt framvegis at kunna vera við á ymsan hátt. Minnist verkið, vitjanirnar og samskiftið við mong menniskju.

**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Eva 17, Miriam Joy 14, Noah 11, Lydia Sigrid 0**

## *10. Mikudagur* *5. Mós. 3.1-14*



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 14**
Vit hava tey seinastu tvey árini savnast við øðrum lokalum trúgvandi í bygdarhúsinum í grannabygd. Hetta er ung samkoma, ið søkir Harrans leiðslu at leiða tey framá. Biðið um vøkstur.
★ Í dag fyllir Joy Hanna Tuohy 1 ár.

## *11. Hósdagur* *Sálm. 119.23-46*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Hvønn hósdag kl. 13 - 15 er „sprogcafé“ í Glostrup Frikirke, Østervej 12. Kaféin er fyri kvinnur, sum gjarna vilja venja danska málið og tosa um viðurskiftir í Danmark. Harumframt verður orð úr Skriftini lutað og drekkamunnur aftaná. Guðrun Kjølbro og Yana úr Bulgaria standa fyri kaféini. Vit vóna, at kaféin verður væl vitjað í nýggja árinum.

## *12. Fríggjadagur* *Matt. 3.1-17*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 11, Rebekah 9, Lydia 7**
Higartil hava meir enn 1500 fólk tikið kurdisku bíbliuappina Pertukekem niður. Bøn okkara fyri 2018 er, at 15.000 fólk taka appina niður.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *13. Leygrdagur* *5. Mós. 3.15-29*



### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

Vit hava barnatiltak heima. Nøkur børn, sum hava verið á legu, koma. Harumframt koma eisini onkur onnur.

### GRØNLAND, Juvel II
### Anna og Óli Steinberg

## *14. Sunnudagur* *Matt. 4.1-11*



### GRØNLAND, Nuuk
### Hans Sivertsen

Í des. flutti Anne Marit Skare aftur til Noregs. Hon hevur virkað í Grønlandi í 26 ár, 2 ár í Paamiut og 24 ár í Nuuk og hevur hesi árini undirvíst nógvum einstaklingum, hjúnum og smærri bólkum heima. Ane og Filip og Anne Sophie og Óli halda á at undirvísa teimum heima, sum Anne Marit undirvísti, umframt fleiri nýggjum. Pláss er fyri umleið 50 fólkum í salinum í Epanezer, sum viðhvørt er nærum fullur. Biðið, at Harrin vísir okkum eina loysn hesum viðvíkjandi.

## *15. Mánadagur* *5. Mós. 4.1-24*

### GRØNLAND, Qasigiannguit
### Solveig og Daniel Kinda

Miðskeiðis í jan. vitja grønlendsk hjún okkum her í USA. Tey luttaka á møtum og greiða frá um Qasigiannguit. Solveig skal tulka úr grønlendskum til enskt.

## *16. Týsdagur* *Matt. 4.12-25*



**FØROYAR**
**Anja Nielsen**
Eg takki øllum, sum hava biðið og stuðlað mær øll 10 árini í fulltíðar tænastu á Filipsoyggjum. Eg gleði meg nú at vera saman við familju, vinum og samkomuni og vóni at fáa arbeiði. Tíðin á bíbliuskúlanum í Eysturríki var sera gevandi.



**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 10**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**
★ Í dag fyllir Hadassa Christiansen 7 ár.

## *17. Mikudagur* *5. Mós. 4.25-49*



**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 13, James 11,**
**Micha David 7**
Ein felagsskapur í Paraguay hevur fingið 10.000 evangeliskar bøkur frá okkum í GoodSeed og hevur sett sær fyri at hava 600 stutt skeið fyri samkomuleiðarum og trúboðarum næstu tvey til fýra árini fyri at menna og stuðla teimum at røkka út við evangeliinum. Harrin hevur svarað bønum.

## *18. Hósdagur* *Sálmur 119.47-69*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 15, Megan 13,**
**Trisha 5, Emma 1**

Samkoman er flutt til bygdina Jelsi. Tíverri eru myndugleikarnir í Jelsi, t.v.s. borgarstjórin og katólski presturin, ikki vinarligir mótvegis okkara samkomu. Biðið, at Gud ger eitt verk í hjørtum teirra og opnar veg fyri evangeliinum í hesum nýggja øki.

**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 4, Micah 4**

## *19. Fríggjadagur* *Matt. 5.1-16*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 0**

Vit eru nú aftur í Papua Ný Guniea. Philip fer í næstum á kanningarferð til ættarbólk, ið biður um at fáa trúboðarar. Síðan fer hann at starvast á fíggjardeildini. Vit royna at læra eina familju at kenna, sum er fús at arbeiða saman við okkum í ættarbólki.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, NTM**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 6**

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 9, Noah 8, Karis 4, Judah 2, Ethan 0**

## *20. Leygardagur* *5. Mós. 5.1-16*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Vit eru takksom, at Harrin hevur brúkt okkum í tænastuni í lívinum hjá menniskjum bæði her í Turkalandi og aðrastaðni í farna ári. Samstundis hyggja vit framá, vitandi, at Harrin heldur okkum í sínum hondum.

## *21. Sunnudagur* *Matt. 5.17-32*

**OM-FØROYAR**

Í des. fóru Tummas í Djónastovu og Tóta og Kristinn Akursmørk umborð á Riverboat í tríggjar mánaðir. Kristina Foldbo fer síðst í jan. til MDT í Moldova og Rumenia. Logos Hope er í løtuni í Kolumbia. Umborð eru Elsa Steinberg Joensen og Bartal Danielsen. Sigrun Vang av Glyvrum og Maria Petersen úr Fuglafirði fara ávikavist til Montenegro og Kosovo í 2 ár. Tey byrja á GO-stevnu í Týsklandi í 2 vikur; Anita fer við sum umboð fyri OM-Føroyar. 16. - 18. febr. er aftur Mini-Teenstreet í Runavík, tá Josh og Debs úr USA luttaka.

## *22. Mánadagur* *5. Mós. 5.17-33*

**OM-FØROYAR**
**Anita og Oddmar Tausen**

Í jan. fer Anita á GO-stevnu hjá OM í Týsklandi saman við Sigrun Vang og Mariu Petersen. Tað er spennandi at senda tvær ungar lívsglaðar gentur út í Harrans tænastu í 2 ár. Biðið fyri Sigrun og Mariu. Vikuskiftið 25. - 28. jan. hava vit ungdómsstevnu í Nebo.

## *23. Týsdagur* *Matt. 5.33-48*



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Cathy og eg hava verið í brúdleypi hjá Farida á Filipsoyggjum. Hon búði hjá okkum í fleiri ár og er vorðin okkum mestsum ein dóttir. Í febr. fari eg aftur til Filipsoyggjar í sambandi við rættlesing. Nógv fyrireiking krevst, áðrenn eg fari.

## *24. Mikudagur* *5. Mós. 6.1-25*



**SAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 13, Micah 10, Ezra 9,**
**Uhenya 6, Boas 4**

Vit prísa Gudi fyri allar hurðar, hann hevur opnað, og gleðast um øll tey, sum standa saman við okkum. Biðið, at Harrin signar, nú vit eru í Føroyum. Vit fara aftur til Zambia 1. febr.

## *25. Hósdagur* *Sálmur 119. 70-92*



**VENESUELA, Puerto Ayacucho**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Vit fegnast um at hava fingið flúgvarabensin til tríggjar túrar inn í skógin. Enn er nógv trot og hjálpartoymi eru, sum ikki sleppa inn í ættarbólkin at hjálpa. Vit biða eisini um fáa nýggjan flogskipara at flúgva í 2018.

## *26. Fríggjadagur* *Matt. 6.1-15*



**GUINEA VESTURAFRIKA,**
**Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Jens Allan 16, Ryan 8**

Hans Arni hevur verið óvanliga móður seinastu tíðina. Tí fer hann til USA 9. jan. í ein mánaða til læknakanningar. Marion og Ryan verða eftir í bygdini Nalu. Vit royna at menna eitt virkið barna- og ungdómsarbeiði. Seinast møttu fleiri dreingir ein tíma áðrenn fyri ikki at vera ov seinir. Vit eru fegin um møguleikan at leggja gott í børnini. Veðrið er nú tíbetur nakað kaldari, men her eru rembingar, tí tveir menn eru tilnevndir samtíðis at vera høvdingi í bygdini.

## *27. Leygardagur* *5. Mós. 7.1-26*



***BØNARLØTAN ynskir Judy og Óla hjartaliga tillukku við gullbrúdleypinum í dag!***



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 14, Rebekka 12, Hanna 9**

Nógvar smáar samkomur á Suðurpalawan eru áhugaðar at fáa tilfarið, vit hava framleitt. Men tað krevur, at tey eisini fáa undirvísing í, hvussu tilfarið skal brúkast. Tað verður tíðarkrevjandi, serliga hjá Tim., tí tilfarið fevnir um fleiri røðir av bíbliutímun, sangbók, NT, partar av GT, bíbliuappir og lesibøkur.

⋆ Í dag fyllir Micah Lukama 11 ár.



**FILIPOYGGJAR, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Vit eru sera takksom, at vit fingu allar 10.000 kankanaey bíbliurnar fyri jól. Biðið, at tær verða latnar, har tørvur er. Hetta árið vitja vit í ymsum samkomum úti í fjarskotnu bygdunum, mest at hjálpa trúgvandi at brúka tilfarið, vit hava skrivað til evangelisering. Vegirnir eru vandamiklir, krókutir, brattir og langt uppi í fjøllunum.



**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karina 16**

**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 7, Leah Eve 4**
⋆ Í dag fyllir Emma Grace Tuohy 10 ár.
⋆ Í dag fyllir Adonia Johannesen 10 ár.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Selma Godtfred, Kristianna J. Heinesen, Jónvør Christiansen, Lea Wolles, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## 29. Mánadagur 5. Mós. 8.1-20



### FØROYAR

**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 10, Svend 9, Terji 5, Petra 3**

Evangelisk tiltøk í samkomum og felagshúsum kring oyggjarnar liggja okkum á hjarta. Arbeiðið er byrjað at teksta dokumentarfilmin frá fyrru fløguni „Tvey lív, ein lívsleið“ til danskt, grønlendskt og enskt.

**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**

## 30. Týsdagur Matt. 7.1-14

### JAPAN

**Shino og Hallur Mortensen, Kano 8, Nana 6, Louie 4**

Shino er komin at kenna nógvar mammur í grannalagnum, og fleiri komu eisini við sínum børnum til samkomukaféina og jólaveitsluna. Biðið, at Shino fær góð høvi at luta sína trúgv, og at tær taka móti gleðiboðskapinum. Hallur stríðist at læra seg japanskt.

★ Í dag fyllir Petra í Prestgarði 4 ár.
★ Í dag fyllir Tabita Christiansen 4 ár.

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *31. Mikudagur* *5. Mós. 9.1-14*

**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

**Nýggj bók!**

**220 kr.**




John C. Lennox greiðir frá, hvussu Guds almáttur og frælsi menniskjans kunnu fatast og sameinast. Hann greinar hugtakið frælsi mótvegis lagnutrúgv og greiðir frá, hvat evangeliini og Rómbrævið læra um evnið við Ísrael sum dømi. At enda viðger Lennox vísiliga, hvussu kristin sannføring og trúarvissa ríka lívið.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo